## Rice góðkendi píning



Sum trygdarráðgevi góðkendi Condoleezza Rice í 2002, at CIA kundi brúka harðliga framferð ímóti fólki, sum vóru undir illgruna fyri yvirgang. Tað stendur at lesa í einari frágreiðing, sum er komin fram í sambandi við, at ein nevnd hjá Senatinum kannar framferðina, sum CIA brúkti, tá fólk undir illgruna fyri yvirgang blivu avhoyrd. Millum annað er avdúkað, at CIA brúkti tann sokallaða waterboarding-háttin heilar 266 ferðir ímóti einum fanga. Við waterboarding verður vatn stoytt oman yvir andlitið á fanganum, meðan hann liggur á rygginum. Fangin kennir tað, sum at hann verður druknaður, og framferðin er skrásett sum píning. Kanningarnevndin hjá Senatinum sigur, at Condoleezza Rice og aðrir leiðandi persónar í stjórnini hjá George W. Bush, forseta vórðu kunnað um framferðina hjá CIA í 2002.

## Skulu geva seg yvir

Trygdarráðið hjá ST krevur, at teir tamilsku uppreistrarmenninir har norðuri í Sri Lanka skulu geva seg yvir til stjórnarherin og geva sivilfólkinum í umráðnum frítt at fara. Tær seinastu vikurnar hevur stjórnarherurin rikið uppreistrarmenninar upp í ein krók. Men har eru eisini umleið 50.000 sivilfólk, sum ikki sleppa nakran veg orsakað av bardøgunum.
ST-trygdarráðið sigur, at tað eru uppreistrarmenninir, sum hava ábyrgdina av lagnuni hjá sivilfólkinum, og ráðið krevur, at tey sleppa burtur úr umráðnum alt fyri eitt, og at uppreistrarmenninir gevast við mótstøðuni.



*Sambært sektaruppskotinum fekst øll oljan á Nólsoyarfirði niður í ein vanligan fiskakassa*

# 700.000 fyri at taka ein fiskakassa av olju upp

**Tað kostar sambært almennu upplýsingunum, ið eru komnir fram, 700.000 krónur at taka 1000 litrar av tungolju upp. Men tað finnast nógvar náttúrligar frágreiðingar til hetta, sambært avvarðandi myndugleikum**

OLJUDÁLKING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Bótin til Capitan Gorbatjov er sett til 50.000 krónur. Hon er sambært Innlendismálaráðnum sett til hesa upphædd, tí í Havumhvørvislógini er vegleiðing, ið leggur upp til 50.000 krónur í bót fyri 1000 litrar av olju.

Sambært fyribilstølum hjá Innlendismálaráðnum kostaði tað næstan 700.000 krónur at fáa bilbugt við hesa olju. Talið verður tó eitt sindur lægri, og oljan er helst meira enn júst eitt tons.

- Tað er onki forgjørt í at ruddingararbeiðið kostar so nógv, og bótin kann eisini gerast nógv hægri, tí helst eru meira enn 1000 litrar farnir á sjógv, sigur Jákup Pauli Joensen, stjóri á Umhvørvisstovuni.

Anni á Hædd, deildarstjóri á Náttúrudeildini hjá Innlendismálaráðnum, greiðir somuleiðis frá, at orsøkin til at kostnaðurin gjørdist so stórur til uppruddingina, millum annað er, at tað var so torført at finna útav, hvar oljan fór, umframt, at oljan broytir skap, so skjótt hon er komin á sjógv.

- Tað verður so tíðliga myrkt, og dálkingin hendi um kvøldið. Longu morgunin eftir kannaðu vit málið, og síðani gekk væl, hóast oljudálkaðar økið varð vorðið øgiliga stórt, greiðir Anni á Hædd frá.

Somuleiðis greiðir hon frá, at oljan spjaddist sera skjótt, og at tað ikki bar til at demma oljuna inni beinanvegin.

Hon leggur afturat, at 1000 litrar av flótandi olju ikki koma upp, sum 1000 litrar av flótandi olju.

- Okkurt er mest átøkt seyðasparlum og okkurt verður blandað við sjógvin. Tað veldst temperatur og so framvegis. Bara ein lítil partur verður verandi flótandi olja, staðfestir Anni á Hædd.

### Vil ikki rinda

Capitan Gorbatjov er kravdur at veita trygd fyri 50.000, sum sektaruppskotið er. Men skipið hevur ikki tikið við bótini, og tí kemur málið helst fyri rættin. Og tað skilst eisini, at mongdin av olju er sett sera lágt.

- Teir hava ikki tikið við bótini, og vit vóna, at eitt rættarmál kemur burturúr, tí mongdin av olju er helst nógv størri enn 1000 litrar. 1000 litrar er bara tað, vit kunnu staðfesta við vissu, men nøgdin kann gerast nógv størri, og so verður bótin ta størri, sigur Jákup Pauli Joensen, stjóri á Umhvørvisstovuni.

Nøgdin kann verða upp til 10.000 litrar skilst.

### Prísurin minni

Hóast skipið er kravt eftir 700.000 krónum fyri uppruddingararbeiðið, verður prísurin fyri arbeiðið helst ikki so høgur.

- Vit funnu fram til, at tað helst fór at kosta einar 700.000 krónur at taka oljuna upp, men tað er líkt til, at tað ikki fer at kosta so nógv, tá tað kemur til stykkis, greiðir Anni á Hædd frá.

Hinvegin kann hon ikki fara í detaljur, hvat hvør liður hevur kostað, tí hesi tøl eru ikki endaliga gjørd upp enn.

So enn er ikki til at siga, um tað hevði borið til at gera arbeiðið bíligari, um ein verulig tilbúgving var.

### Mangla tilrættarlegging

Á eftirmetingarfundi kom fram, at tað vóru fleiri ting, ið kundu gerast betri í sambandi við framtíðar oljudálkingar.

- Í niðurstøðuni kom fram, at vit mangla eina veruliga yvirskipaða ætlan, so vit vita júst, hvør skal gera hvat. Somuleiðis vantar okkum útgerð til tungolju, men tað vísti seg eisini, at fólk vildu væl og at fólk høvdu ein sera góðan vilja at fyribyrgja eini vanlukku, greiðir Jákup Pauli Joensen frá.